# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

**Bilradio á Rás2**

Bilradio verður sent hósdag kl. 16.05, fríggjadag kl. 8.00 og leygardag kl. 13.

# Exeo - Seat útgáva av Audi

**Ein av nýggjheitunum á Paris Motor Show í oktober var Seat Exeo, ið er ein sedan, sum er bygdur yvir ein Audi A4 plattform. Bilurin kemur á marknaðin í 2009**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Leingi hevur ljóðað at Seat fóru at koma við einum nýggjum bili í størra miðalklassanum. Fleiri tekningar hava verið vístar í ymiskum bilbløðum við nøvnum sum t.d. Seat Bolero og Seat Proteto. Men endaliga úrslitið er hesin nýggi Seat Exeo, sum varð presenteraður á Paris Motor Show i oktober.

Seat Exeo líkist nógv Audi A4 bæði uttan og innan, men við sínum egna identiteti. Bilurin verður gjørdur á Seat verksmiðjuni í Martorell, nærhendis Barcelona.

Í fyrstu atløgu verða seks ymiskir motorar at velja ímillum, sum allir lúka teir strongu Euro-5 normarnir fyri $CO_2$ útlát. Tíggir bensinmotorar frá 102 til 200 hk, og tríggir dieselmotorar frá 120 til 170 hk. Roknað verður við, at Seat Exeo verður bíligari enn Audi A4.

Seat EXEO kemur á spanska marknaðin á vári í 2009 og síðan eisini til restina av evropeiska marknaðinum.




*Nýggi Exeo er ein væl útgjørdur sedan við Audi designi, men eyðkendum Seat stíli framman*



*Exeo líkist rættuliga nógv Audi A4 innan*



*Eisini aftan hevur Exeo sín egna Seat indentitet*

